

## Nenad aftur á Skála

Heimasíðan hjá Skála Ítróttarfelag hevur boðað frá, at Nenad Stankovic fer at spæla við Skála tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum.

Ætlanin hjá Skála var alla tíðina, at Nenad skuldi spæla við í ár. Men í januar gjørdist tað greitt, at uppihaldsloyvið ikki fór at verða longt. Í juni varð farið undir nýggja roynd at fáa Nenad aftur til Skála. Í síðstu viku komu endalig boð frá myndugleikunum um, at nú var alt í lagi, og í morgin fer Nenad aftur at seta fótin á land í Føroyum. Um hann er eins væl fyri, sum hann var tað í fjør, so er tað eingin ivi um, at Nenad væl og virðiliga fer at styrkja Skála liðið, sum fyrst fer at ríva seg leyst úr botnstríðnum, og síðani fer at royna at klatra so langt upp eftir talvuni, sum tað ber til.

**-mørk**

## Holst byrjaði málskjótingina

Christian Lamhauge Holst skeyt fyrsta málið, tá Lyngby legði fyri í donsku fyrstu deild við tryggum 3-0 sigri á Aarhus Fremad. Talan var um uppibornan sigur, og eftir at Holst hevði skorað eftir 23 minuttum, var eingin ivi um, hvør skuldi vinna dystin. Við sigrinum kom Lyngby væl ígongd í næst fremstu donsku deildini, har felagið nú hevur vunnið seg fram eftir húsagangin, sum fyri nøkrum árum síðani sendi felagið langt niður í donsku røðina.

**-mørk**

# Tað kostar nógv at skifta fólk



*Har var eingin, sum skalaði Jallin, tá dreingjaróðurin var á skránni*

*Mynd: Álvur*

**Meistararnir megnaðu ikki heiðursmerkjapláss á Ólavsøku, tá ið Jallurin, sum aftur var fullmannaður, vant burtur úr øllum hinum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er so ofta endurtikið, og hervið verður tað sagt fyri síðstu ferð í hesum róðrarárinum: Tað eru marginalirnir, sum gera av, um tað gongur væl, ella um tað gongur minni væl í kappróðri.

Staðfesting av sannleikanum í omanfyri nevndu útsøgn hevur verið í kappingini millum dreingjamanningarnar tvær tær seinastu ferðirnar.

Á Vestanstevnu var Ritan sannførandi vinnari, meðan Jallurin endaði á triðja plássi. Á Ólavsøku var Jallurin sera sannførandi vinnari, meðan meistararnir á Rituni duttu heilt aftur á fjórða plássið.

Manningarliga frágreiðingin hjá teimum á Jallinum var, at teir á Vestanstevnu høvdu róð við óvandum eykamanni, tí ein av føstu monnunum var skaddur. Á Ólavsøku vóru allir teir væl vandu tøkir aftur.

At úrtøkan hjá meistarunum var so løk á Ólavsøku, høvdu teir á Rituni sína frágreiðing um. Ein av teimum, sum hevur verið við til at tryggja teimum so nógvar sigrar í summar, at tað longu á Vestanstevnu rakk til FM heitið, var undan Ólavsøku farin til skips. Harvið noyddist ein, sum bara hevði vant nakrar heilt fáar ferðir, at seta seg millum væl vandu unglingarnar, og tað sást aftur. Soleiðis er tað bara. Hjá teimum, sum knúlvast millum teir bestu, ber tað illa til, um ikki allir eru væl trimmaðir og vandir.

Tá ið startskotið hevði ljóðað, tóktist tað í fyrstu tøkunum, at Ritan aftur á Ólavsøku skuldi seta dám á róðurin. Men soleiðis tørnaði tað ikki út. Tað var Jallurin, sum so rudduliga setti dám á ólavsøkuróðurin.

Startspurturin var ikki meiri enn hálvbardur, tá ið Jallurin hevði lagt seg á odda, og so vísti tað seg bara at vera ein spurningur um, hvussu tryggur sigurin hjá Jallinum fór at verða.

Ritan misti heilt nógv. Kollur og Sílið róðu ógvuliga væl, og teir vóru báðir undan meistarunum, tá ið teir komu á mál.

Jallurin var fullkomuliga suverenur. Á málinum vóru teir leysir av næstu bátunum. Harvið tryggjaði Jallurin sær so rudduliga silvurmerkini í FM kappingini, og eftir róðurin kendu glaðu høvuðsstaðar dreingirnir seg hava vunnið mest sum eyka FM heitið.

Meistaraheitið kundi tó eingin taka frá sundadreingjum. Men tað skerst ikki burtur, at ólavsøkuróðurin ikki roynd so leiðis hjá teimum norðuri í Sundi, sum tað kanska var lagt upp til.

**5-mannafør dreingir – Ólavsøku úrslitið**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Jallurin | 4:40.21 |
| 2 | Kollur | 4:44.08 |
| 3 | Sílið | 4:44.16 |
| 4 | Ritan | 4:45.13 |
| 5 | Strípan | 4:46.20 |
| 6 | Havfrúgvin | 4:50.22 |
| 7 | Drekin | 4:58.06 |
| 8 | Blikur | 5:10.05 |

# Knørrur setti alt upp á pláss

**Ólavsøkusigurin roknaðu teir umborð á Knørri at vera sera týdningarmiklan fyri fagnaðin um FM heitið**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Vit settu alt inn upp á at vinna á Ólavsøku. Hóast vit undan Ólavsøkuni høvdu tryggjað okkum meistaraheitið, so var tað einki sum eitur. Tað ber ikki til at damla seg til sigur. Tí góvu vit alt, sum var í okkum. Vit vunnu, og tá ið tú vinnur, kanst tú ikki klaga um nakað sum helst, og tað gera vit heldur ikki, søgdu fegnu vinnararnir av FM heitinum og ólavsøkuróðrinum.

Knørrur hevur tríggjar ferðir áður vunnið FM. Fyrsta ferðin var í 1985, og so vann Knørrur aftur í 1989 og í 1990. Hetta var bara onnur ferðin, at Knørrur bæði vann FM og ólavsøkuróðurin. Fyrra ferðin var í 1985.

Ørvur fekk besta startin og var fremstur, inntil bátarnir komu á Molan. So var tað, at Knørrur rættuliga fór undir uppvísningin. Fram við Molanum og harvið frammanfyri áskoðarafjøldini munaðu tøkini sera nógv, og tað var eingin ivi um, at hetta var rætti meistarin og ólavsøkuvinnarin.

Ørvur misti framvið Molanum. Argjabáturin tók akkurát Ørv, og hvørgin teirra kundi gera nakað við Knørr, sum var tað mesta av einari bátslongd undan teimum næstu.

Tað hevur leingi verið roknað við, at Nevið Reyða fór at gera um seg í síðstu kappingunum, men tað vísti seg ikki at verða soleiðis. Aftur hesa ferð var Nevið Reyða aftanfyri hinar tríggjar.

Nú er stóri spurningurin, hvussu tað næsta ár fer at verða við kappingini millum 8-mannaførini. Luttakaratalið hevur neyvan verið so lágt áður, sum tað hevur verið tað í ár. Tað hevði verið framúr, um fleiri høvdu tikið lut, og um fleiri høvdu verið við í kappingini um fremsta plássið.

Kvívíkingur hevur oftast verið ógvuliga drúgvur, men í ár var hann bara við á Fjarðastevnuni í Vestmanna.

**8-mannafør – Ólavsøku úrslitið**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Knørrur | 4:19.04 |
| 2 | Argjabáturin | 4:21.05 |
| 3 | Ørvur | 4:21.15 |
| 4 | Nevið Reyða | 4:24.04 |

